# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Límið loysnað

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fær illa dult sítt vónbrot, nú fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum hava sýtt fyri at góðtaka útsetingina av avtalaðu lønarhækkingini. Útsetingin, sigur landsstýrismaðurin, var límið, sum skuldi halda kreppupakkanum saman. Hann heldur fast við, at neyðugt er at spara í almennu útreiðslunum, og hesa støðu tvíheldur landsstýrismaðurin um, sama hvat búskaparfrøðingar siga. Búskaparfrøðingarnir hava gjørt vart við, at hetta er tann vælkenda støðan, har landið skal stimbra heldur enn at tálma. Tálma skal ein í tíðum, har búskapurin kókar yvir, har inflatiónin hóttir, trot er á arbeiðsmegi og alt tykist fara yvir gevind. Er støðan hinvegin tann, at virksemið í samfelagnum støðugt minkar, og arbeiðsloysið harvið økist, ja so eiga stimbrandi tiltøk at verða sett í verk. Sum kunnugt hava fíggingarstovnarnir lyndi til at halda aftur undir slíkum umstøðum, og tí er tað bert tað almenna, staturin, ið kann kann traðka til við búskaparstimbrandi tiltøkum. Tað almenna hevur sum kunnugt til eina og hvørja tíð møguleikar at útvega neyðturviliga gjaldføri, sum kann stimbra følnandi búskaparligt virksemi ella at gera tað øvugta.

Søgan seinastu fimti árini hevur víst, at vit í Føroyum duga illa at stýra teimum búskaparligu sveiggjunum, ið koma fyri í einum marknaðarbúskapi. Vit seta stór almenn arbeiði í gongd, tá virksemið annars er stórt, vit tálma ikki, tá tálming er tann fyribyrgjandi heilivágur, sum samfelagnum tørvar. Tá stórkreppan rakti okkum við ræðuligari megi, slógu vit so harðliga bakk, at øll dekkslastin fór í havið. Úrslitini hava vit sæð ferð eftir ferð uttan at gerast klókari.

Flestøll framkomin lond hava langt síðan avlisið støðuna og hava avgreitt sínar vakstrarpakkar teir flestu eftir Keynes klassiska leisti. Hjá okkum hendir einki. Ein kreppu- og vakstrarpakki hevur leingi verið ávegis, men landsstýrið hevur sett sær fyri at hann skal límast saman við lønarsteðgi hjá tí almenna. Nú hava avvarandi feløg noktað, og límið er loysnað, sum fíggjarmálaráðharrin so rámandi tekur til. Orsøkin til, at ein hevur valt júst hetta límið, er valla skilagóðar búskaparligar grundir, men heldur eru orsøkirnar politiskar. Borgarligu samgonguflokkarnir reka virðisstríð, og kreppan skal nýtast til at geva fakfeløgunum ein lærupenga.

Tað er væl skiljandi, at fakfeløgini hava sagt nei, tí tey hava upplivað hetta áður. Royndirnar av tí læruni vóru ikki góðar. Samgongan átti at kunna sagt sær sjálvum, at hetta fór ikki at ganga, men ideologisk fyrilit og flokspolitisk egináhugamál vunnu á viti og skili, og nú liggur samgongan, sum hon sjálv hevur reitt. Nógv tíð er farin fyri skeyti, pakkin er skrædnaður, innihaldið fokið, og einki hendir. Hetta er ikki nóg gott! Tað má kunna bera til at semjast um ein klassiskan kreppupakka, tá allar aðrar stjórnir í heiminum megna tað. Nú mugu landsstýrisflokkarnir taka seg saman, leggja alt smáligt ideologiskt smáputl til viks, fara í arbeiðsklæðini og koma við tí neyðturviliga kreppufyribyrgjandi og virkisemisfremjandi pakkanum.

**Sosialurin**

## Hvør er ímóti einum vælvirkandi sjúkhúsverki?

**BERGTÓRA H. JOENSEN**



Júst so – eingin! Øll vilja vit kenna okkum í tryggastu og bestu hondum, tá okkara kæru ella vit sjálvi gerast sjúk. Vit kunnu fegnast um, at viðgerðarmøguleikarnir gerast betri í hvørjum á nógvum økjum. Vit senda landsmenn og kvinnur til serviðgerð uttanlands og fáa serfrøðingar hendanvegin. Soleiðis skal tað vera. Men, tað kostar og er ivaleyst ofta givið væl út.

Men hinvegin, kunnu vit blíva við at siga, at vit vilja varðveita verandi sjúkhúsverk, sum tað er í Føroyum – umframt viðgerð uttanlands í størri og størri mun?

Vit síggja afturvendandi meirnýtslu í á heilsuøkinum umframt at kostnaðurin á uttanlandsviðgerð er vaksandi. Viðgerð í Danmark, Íslandi og aðrastaðni.

Lat meg siga beinanvegin, at tá talan er um ikki loyvda meirnýtslu skal tað sjálvandi hava fylgjur – ikki minst, tá økið hevur fingið allar tær játtanir og eykajáttanir, sum hava verið umbidnar. Men tað er ikki ólógliga meirnýtslan, eg her ætli at viðgera.

**Hvat bleiv av Valcon?**

Tað er væl í lagi og neyðugt at undrast ella seta spurnaðartekin við raðfestingar eisini innan sjúkhúsverkið? Ella hvussu?

Minnist tíðindafundin í heyst í samband við fíggjarstýringina á sjúkhúsinum. Hann snúði seg um sonevndu Valconkanningina. Haldi ongantíð at kanningin og úrslitini veruliga komu til sín rætt og blivu viðgjørd. Í kanningini verður føroyska sjúkhúsverkið sammett við Bornholm, Áland, Gotland, Ísland og Grønland.

**Politisku raðfestingarnar**

Valconkanningin sigur púra greitt, at umráðandi er, at politikarar taka støðu til, hvat teir vilja hava fyri upphæddina, sum er vaksandi til tey trý sjúkhúsini umframt uttanlandsviðgerð. Vit vita, at hetta snýr seg um risastórar upphæddir , men løgið er, at vit – politikarar - ikki av álvara tora at siga hart, hvat vit vilja hava fyri peningin.

Haldi oftast at politikarar bara siga: "Vit skulu hava eitt vælvirkandi heilsuverk, og vit skulu hava tað gott!" – men hvat merkir tað? Svarini eru sera ymisk.

Annars segði ein klókur maður við skili fyri heilsupolitikki: "Einki land fær nakrantíð ráð at veita øllum fólkinum alla ta viðgerð, kanningar og allan tann heilivág, sum vit vita virkar. Heldur ikki, um øll BTÚ verður brúkt til tað!"

Enn ein grundgeving fyri, hvussu umráðandi tað er, at vit raðfesta.

Er tað ok at vit onga barnapsykiatriska deild hava? At Psykiatriski Depilin aftur er útsettur? Áttu vit at umskipa ávísar partar av sjúkhúsverkinum – endurvejingarmiðstøð og seruppgávur úti um landið. Sjálvsagt, er umráðandi at varðveita arbeiðsplássini. Tørvurin á teimum er enn størri júst nú, enn hann hevur verið í fleiri ár.

**Skilji væl óttan**

Tað, tey flestu helst hugsa er: Um vit niðurleggja sjúkrahúsið missi eg og fleiri við mær arbeiðið! Eg hugsi, at vit sjálvsagt skulu varðveita almennu arbeiðsplássini. Tørvurin á teimum er størri nú enn hann hevur verið mong ár. Alt økið sum hevur við endurvenjing at gera – ein slíkan depil hevur okkum tørvað í mong ár. Haldi, álitið um endurvenjingi Eysturoynni ljóðar avbera skilagott. Framúr initiativ.

Harumframt eru mong, sum bíða og bíða eftir einum røktarheimsplássi. Børnini sum játtanin til barnapsykiatriina røkkur til at diagnostisera, men ikki til at viðgera sálarsjúk børn og ung. Harumframt er alt fyribyrgjandi arbeiðið á heilsuøkinum, sum pengingur ikki er játtaður til – men sum altíð loysir seg nógv betri og er bíligari enn viðgerð.

**Hvør er glaður?**

Fái toknir av, at ávís evni eru nærum tabu at tosa um. Men sjúkhúsverkið og heilsuverkið sum heild er avbera kostnaðarmikið – tað merkir ikki, at starvsfólkini ikki eru arbeiðssom ella at tey eru dovin. Heldur ikki at fysisku karmarnir eru framúr.

Man tað merkja, at vit ikki hava torað ella dugað nóg væl at raðfest innan økið. Ger tað nakran glaðari? Fær nakar eina betri heilsu av tí ella gerst skjótari frískur?

Ført hevur verið fram, at sjúkhúsverkið í Føroyum framvegis er bíligari enn í londunum rundan um okkum. So er, staðfesti Valconkanningin, men tað bleiv eisini sagt, at vit seinastu árini hava nýtt nógv størri upphæddir til sjúkhúsverkið enn áður. Og at tað ikki kundi halda áfram óbroytt. Ein kann so spyrja, hvat hava vit fingið fyri peningin, sum vit nýta meir í dag? Eru tað sjúklingarnir, starvsfólkini ella tey avvarðandi sum hava fingið betri kor? Tað eru helst fleiri svar. Men eg haldi meg ikki hava hoyrt nakran siga, at tey sum sjúklingur ella starvsfólk veruliga hava kent seg raðfest ovarlaga ella at umstøðurnar eru batnaðar munandi – tvørturímóti! Og tað er væl essensurin, at vit mugu hava størri gjøgnumskygni. Bæði so at vit vita, hvat vit fáa fyri peningin og so at fólk vita, hvussu peningurin verður nýttur.

**Oftari og longri innlagdir**

Eisini vísti kanningin, at føroyingar verða oftari og longri innlagdir enn í londunum rundan um okkum – hetta hóast føroyingar sum er, eru yngri enn í londunum rundanum okkum og heilsustøðan her er góð. Tískil áttu vit at verði sjáldnari innlagdir. Tí vanliga eru fólk oftari og longri innløgd, jú eldri tey eru. Hvussu fer hetta mynstrið at ávirka okkum framyvir ?

**Sjúklingaráðið skal vera við**

Tað undrar meg, tá eg í miðlunum hoyri, at Sjúklingaráðið varð kunnað um broytingarnar í samband við uttanlandsviðgerð seinast í juni mánaða. Í kunngerðini frá 2006 um Sjúklingaráðið stendur millum annað:" Høvuðsuppgávan hjá sjúklingaráðnum er at viðgera mál av generellum og prinsipiellum týdningi fyri veitingar til sjúklingar.." Hví verða tey tá ikki tikin við upp á ráð – sum fremsta uppgáva teirra er - eisini tá broytingar skulu fremjast?

**Komandi tingseta**

Vóni, at komandi tingseta fer at bera brá av skilabetri og veruligum raðfestingum – raðfestingum sum geva arbeiðið fleiri til føroyskar hendur – bæði í mun til íløgur og rakstur. Lat okkum tora at siga hart, og tora at kjakast um, hvat vit vilja raðfesta.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.